## Børn skulu ummæla

Býarbókasavnið í Havn skipar í summar fyri ummælarakapping fyri børn. Øll børn frá 2. til 10. flokk í fólkaskúlanum kunnu taka lut í kappingini. Sagt verður, at tað hevur ikki týdning, hvørjum máli bøkurnar eru á, og eisini er loyvt hjá børnunum at senda inn fleiri ummæli. Freistin at senda inn ummæli er tann 16. august, og verður drigið millum trý gávukort til bókahandil millum tey, sum hava sent inn.



## Bender spiónir við Peturi

Eins á Asfalt, verður havnarbólkurin Bendar Spónir bólkurin, ið stendur fyri tónleikinum, tá Petur Pólson spælir á G! Festivalinum fríggjadagin 24. juli. Petur Pólson og Bendar Spónir spældu eina sera væl eydnaða konsert saman á Asfalt tiltakinum, og hetta hevur millum annað ført við sær, at samstarvið heldur fram. -Tað kennist natúrligt at spæla saman við Bendar Spónir, tí at vit eru á tónleikaligari bylgjulongd, sigur Bogi á Lakjuni, ið eisini spælir við Peturi. Umframt Bendar Spónir, tær tríggjar Dam´urnar, verður eisini Jan Rúni Poulsen við. Hann spælir paukur og percussion.

# Góð úrslit skapa optimismu

**Góðu roknskapirnir hjá fleiri amerikanskum bankum hava skapt eina optimismu, men stóra óvissan innan fíggjarmarknaðin er kortini dominerandi. Eisini partabrævakursirnir kvinka upp eftir, bæði í USA og Europa**

FÍGGJARMARKNAÐUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Høgni Olsen og Arnfinn Gudjónsson, fíggjargreinarar hjá Føroya Banka*
*Mynd: Leo Poulsen*

Amerikanskustórbankarnir, Goldman Sachs, J P Morgan Chase, Bank of America og Citygroup kunngjørdu allir roknskapir, sum vóru munandi betri enn væntað. Men hetta fær kortini ikki búskaparfrøðingar at loypa uppfrá og siga kreppuna at vera venda.

- Tað er so stór óvissa í løtuni, at tað ber ikki til at siga nakað við vissu. Tá ein tíð er fráliðin kunnu vit kanska hyggja aftur á hesar roknskapirnar og siga, at hatta var vendin, men sum støðan er í løtuni, kann tað fara allar vegir, sigur Høgni Olsen, fíggjargreinari hjá Føroya Banka.

Góðu roknskapirnir hjá amerikansku bankunum førdu tó við sær, at partabrøvini hækkaðu. Samstundis boðaði triðstørsti bankin í Danmark, Jyske Bank, frá, at teir hava uppjusterað væntaða ársúrslitið við 300 milliónum krónum. Millum annað hetta hevur gjørt, at eisini partabrøvini á danska partabrævamarknaðinum kvinkaðu rætta vegin.

Eitt annað positivt tekin er, at arbeiðsloysið í USA nú ikki veksur so skjótt, sum tað hevur gjørt.

- Roknskapirnir hava sjálvandi nógv at siga, men tað eru eisini aðrir faktorar, sum spæla inn, eitt nú arbeiðsloysi, framleiðsluvinna og líknandi, sigur Høgni Olsen.

Men hóast góðu roknskapartølini hava bankarnir framvegis risastórar avskrivingar at dragast við, og av tí sama hava vánirnar fyri úrslitunum ikki verið tær stóru. Og tað er so aftur orsøkin til, at úrslitini hava verið so nógv betri enn væntað.

### Upp og niður

Í norðurlondum vórðu roknskapir eisini kunngjørdir. Nokia hevði ein ikki so góðan ársfjórðing, sum roknað annars var við. Hinvegin vísti roknskapurin hjá Electrolux eitt betri úrslit enn framman undan væntað.

Nýtsluvørufyritøkan Johnson&Johnson vísti ein betraðan roknskap, meðan tann hjá General Electric var áleið so sum roknað var við.

- Smásølan vaks meiri enn væntað í síðsta mánaði, men her er tað serliga, at bilaframleiðarar eru farnir av knóranum, og tí hevur bilasølan verið størri enn vanligt við rímiliga bíligum bilum. Verður henda sølan drigin frá, var hækkingin minni enn væntað, sigur Arnfinn Gudjónsson, fíggjargreinari hjá Føroya Banka.

Eitt annað, sum hevur eina negativa ávirkan á búskapin er, at amerikanski hugurin at spara upp pengar er vaksandi, og hetta merkir, at minni forbrúk og harvið minni peningur í umfari.

Annars hava tølini kvinkað upp eftir javnt og samt síðani mars í ár, men stagneraðu aftur í juni.

- Ymsu hjálparpakkarnir taka tíð at sláa ígjøgnum, og niðurgongdin hevur verið størri enn positiva ávirkanin av hjálparpakkunum. Tí skal ein tíð ganga, áðrenn úrslitini síggjast, sigur Høgni Olsen.

### Positivar ábendingar

Hinvegin eru positivar ábendingar at hóma.

- Arbeiðsloysið í USA er hitt størsta síðani 1980-ini, men tað veksur spakuligari nú enn tað hevur gjørt. Ávirkanin merkist fyrst í USA, síðani í Europa, og síðani Danmark, áðrenn vit merkja nakað her í Føroyum, sigur Høgni Olsen.

Partabrævakursirnir hava verið hækkandi síðani mars, tí tá sóust fyrstu ábendingarnar um eina vending. Nú vátta bæði bankaroknskapir og onnur lyklatøl hesa broyting. Kursirnir eru nógv hækkaðir, bæði í USA, men eisini í Danmark.

- Tað kemur alt ann upp á, hvussu marknaðurin sær upp á framtíðina. Trýr marknaðurin upp á framtíðina, ávirkar tað kursirnar positiva vegin, sigur Arnfinn Gudjónsson.

Men vandi er í hvørjari vælferð. Baltisku londini hava trupulleikar, og har eru tveir stórir svenskir bankar álvarsliga inni í myndini. Talan hevur verið um, at Lettland skal niðurskriva sítt gjaldoyra, og tað kann fáa álvarsligar avleiðingar fyri svensku bankarnar. Men fyribils velja flestu búskaparfrøðingar at síggja tíðina ann, tí sum nú er, er tað óvissan sum yvirskuggar alt. Eisini hóast amerikansku bankarnir fingu ein sera góðan annan ársfjórðings roknskap.